# NÓGV BROYTT



*Tey sum minnast, hvussu økið á Hálsi áður sá út, og hyggja eftir hesi myndini, kunnu ikki annað enn staðfesta, at ger er nógv broytt. Frá at hava verið eitt friðarstað hjá fugli og seyði, er tað í dag eitt livandi handilsøki, við lív og larmi av vinnuførum hondum. Henda myndin varð tikin mikudagin í farnu viku á Oyggjarvegnum. Og hon talar fyri seg.*

*snorri@sosialurin.fo*

# Brúka avlopshita á Hálsi

## Í 2006 góvu Jarðfeingi og Vinnumálaráðið út eina frágreiðing við heitinum "Yvirskipaður orkupolitikkur".

Orð: Snorri Brend

Í hesi frágreiðingini vóru málini fyri 2015 tikin við, har 20 prosent av orkunýtsluni á landi skulu stava frá varandi orku, og at fiskiflotin skal nýta 15 prosent minni orku í mun til veiðinøgdina.

Ein partur av frágreiðingini snýr seg júst um økið á Hálsi, og her verður nevndur møguleikin at brúka avlopshita frá elverkunum kring landið.

Sagt verður í frágreiðingini:

Við at gagnnýta avlopshitan á Sunds- og Vágsverkinum verður mett, at umleið 20 - 25% av orkuni í oljuni kann gagnnýtast til hiting, og at nyttustigið sostatt kann økjast úr 41% til 66%.

Um 25% av oljuorkuni kom til høldar sum hiti hjá brúkarum gjøgnum fjarhitaskipanina, svarar tað til eina árliga sparing uppá umleið 7.000 tons av gassolju, sum við dagsins prísum (5 kr/l) hevur eitt virði uppá góðar 40 mill kr íroknað avgjøld.

Fjarhitafelagið leggur nú rør til elverkið á Sundi, soleiðis at avlopshitin frá hesum kann gagnnýtast í fjarhitaskipanini í Hoyvík. Ein spurningur í hesum sambandi er, um fjarhiti skal leggjast til ein enn størri part av høvuðsstaðarøkinum, t.d. til økið á Hálsi og Gundadali, sum hevur fleiri stórar brúkarar, so sum ítróttarhøll, svimjihøll umframt Norðurlandahúsið og Kringvarpið.

Av fýra motorum á Sundi eru bert teir báðir eldru motorarnir uppá 12,4 MW hvør útgjørdir at veita avlopshita. Um gjørt varð av at veita fjarhita til ein størri part av býnum, má metast um, hvørt nýggjaru motorarnir uppá 8,1 MW hvør skulu gerast út við ketlum at veita avlopshita. Tað hevur verið ført fram, at ein útbygging av fjarhitanum á Sundi ikki loysir seg, um so er at varandi orkukeldurnar verða øktar munandi, og tørvurin eftir elorku frá motorverkunum minkar samsvarandi. Tað er tí áhugavert at meta um, nær framleiðslan á Sundi verður ov lítil til at gagnnýtsla av fjarhitanum loysir seg.




*Høllin á Hálsi kundi verið hitað upp við avlopshita frá Sundsverkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*